# NSÍ skoraði á Råsunda

**EVROPA LEAGUE** NSÍ megnaði ikki at gera tað stóra við Gefle, sum vann seinna dystin 2-1 og harvið vinnur samanlagt 4-1 á NSÍ. Málið hjá NSÍ skoraði innskifti Károly Potemkin, sum eisni stóð fyri málinum, tá NSÍ í fjør var á vitjan hjá Rosenborg

Tróndur Arge

Eftir 2-0 tapið fyri Gefle í Gundadali var torført at ímynda sær, at NSÍ skuldi gera nakað við Gefle á Råsunda Stadium í Svøríki. Tað hevði millum annað við sær, at NSÍ hevði givið liðskiparinum og toppskorarinum, Christian Høgna Jacobsen, frí. Fyri uttan hann, so var liðið at kenna aftur, men við tí broyting, at Klæmint Olsen var einsamallur í álopinum.

Fyrra partin av fyrra hálvleiki hendi lítið og hvørki av liðnum legði nógv fyri. Aftaná 25 minuttir kom endaliga staðfestingin av, at NSÍ ikki kemur víðari í hesi Europa League kappingini. Tá legði Daniel Bernhardsson Gefle á odda. Stutt eftir hevði NSÍ góðan møguleika at javna, men málmaðurin bjargaði royndini hjá Klæminti Olsen.

Longu í fyrra hálvleiki má NSÍ gera ein útskifting, tí Einar T. Hansen má út við skaða. Í hansara stað kemur Károly Potemkin. Tað merkir samstundis, at NSÍ má gera nakrar broytingrar á liðnum. Støðan í hálvleikinum er 1-0.

Í seinna hálvleiki situr Gefle á dystinum og eru nær við at økj, men millum annað tvørtræðið bjargar NSÍ. Tá seinni hálvleikur er smáar tjúgu minuttir gamal skorar Gefle aftur. Tá er tað innskifti Hans Berggren, sum roynir seg útfrá og bólturin fer umvegis stólpan í mál.

Síðani hevði Károly Potemkin ein skot roynd sum fór uppum. Løtu seinni skifti NSÍ Árna Frederiksberg inn. Tað er fyrstu ferð at hann kemur inn á besta liðnum hjá NSÍ. Í tíðini sum dómarin hevði lagt aftrat, var hann við í uppspælinum, sum endaði við at Károly Potemkin fekk minkað um munin til endaliga úrslitið 2-1.

Tað var annars lítið av fólki til dystin, ikki fleiri enn einir 500 áskoðarar.

*trondur@sosialurin.fo*

**UEFA Europa League** · Råsunda, 1, Stokkholm. 8. juli 2010

**Gefle - NSÍ** 2-1 (1-0)
**1-0: Daniel Bernhardsson 22.**
**2-0: Hans Berggren 63.**
**2-1: Károly Potemkin 90.**
Dómari: Tero Nieminen, Finnland

**Gefle:** Mattias Hugosson - Daniel Theorin, Sebastian Senatore, Omar Jawo, Jakob Orlov (Hans Berggren, 59.), Hjalmar Øhagen (Eric Larsson, 70.), Daniel Bernhardsson, Alexander Gerndt, Jonas Lantto, Marcus Hansson (Mikael Dahlberg, 53.), Yussif Chibsah
**NSÍ:** Andras Gango - Jónhard Frederiksberg, Jóhan Troest Davidsen, Jens Joensen, Einar T. Hansen (Károly Potemkin, 35.) - Jann Martin Mortensen, Jústines R. Hansen, Jann Ingi Petersen, Heðin á Lakjuni - Erland B. Danielsen (Árni Frederiksberg, 85.) - Klæmint A. Olsen (Debus Danielsen, 71.).
***Gult kort:*** Jann Ingi Petersen 20., Jens Joensen 54., Erland B. Danielsen 78.

# Spenningurin hvarv beinavegin

**EVROPA LEAGUE** Sundalagsmenn høvdu vónir um víðari evropiskari luttøku, eftir at hava tapt tepurt í Svøríki. Men í seinna dystinum liðana millum, lat Kalmar ongan iva vera um hvør var betra liðið, og vann ein greiðan 3-0 sigur á EB/Streymi á Svangaskarði í gjárkvøldið




*Sviar høvdu tak á Gudmundi Nielsen og EB/Streymi*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Ólavur Øre Hansen

Eftir at EB/Streymur tapti tepurt í fyrra dystinum móti Kalmar, var møguleikin fyri einum føroyskum yvirraskilsi til staðar. Men vónin hjá sundalagsmonnum fekk eitt skot fyri bógvin, tá Kalmar legði seg á odda tíðliga í dystinum. Av tí sama gjørdist mótbrekkan hjá sundalagsmonnum ov brøtt,og at enda vunnu sviar ein fult uppibornan 3-0 sigur.

– Vit vistu at fyrsta málið var avgerðandi, tí so skuldi EB/Streymur skora trý mál fyri at vinna samanlagt. Tískil gekk tað sum vit vónaðu, tá vit skoraðu tíðliga í dystinum. Eftir at vit vóru komnir á odda, so høvdu vit so at siga fult tamarhald á teimum, sum endaliga úrslitið eisini ber boð um, segði ein fegin liðskiparin hjá Kalmar, Henrik Rydstrøm, eftir dystin.

Venjarin hjá EB/Streymi, Heðin Askham, var samdur við Henriki Rydstrøm, at fyrsta málið køvdi vónina um víðari evropiska luttøku.

– Undan dystinum høvdu vit tosað um týdninginum av kompaktum verjuspæli, og halda teimum frá at skora. Men av tí at teir skora so tíðliga í dystinum, so gjørdist tað trupult hjá okkum. Men tá tað er sagt, so stríðast vit væl allan dystin. Men tað var bara ikki nokk, tí Kalmar var sterkara liðið, segði ein avgjørdur Heðin Askham eftir dystin.

Spurdur um hetta er munurin á føroyskum og altjóða fótbólti, sigur Heðin, at tað er tað nokk. Hann metti at svensku leikarnir vóru betri enn teir føroysku. Men hóast teir taptu, so vísir Heðin á, at tað er mennandi fyri føroysku liðini at spæla í evropiskari kapping, tí har møta teir ofta væl sterkari liðum, enn tilfeldið er í føroysku kappingini.

## Effektivir sviar

Sundalagsmenn fóru óimponeraðir til verka, og vísti góðar taktir frá dystarbyrjan. Tí var tað sum at fáa váta vøttin tá Kalmar skoraði uppá sín fyrsta líkinda kjans í dystinum, tá skotið hjá Eriki Israelsson, umvegis eitt EB/Streyma bein, fann leiðina til málmeskarnar í níggjunda minutti.

Hóast sviar høvdu lagt seg á odda, so vístu sundalagsmenn góðan stríðsvilja, og komu fram til fleiri horna- og fríspark, men tað bleiv bara til nær við og næstan hjá sundalagsmonnum. Hinvegin, so høvdu sviar eisini sínar kjansir, sum gott kundu havt givið úrtøku, men fleiri mál komu ikki fyri steðgin.

Seinri hálvleikur var bert ein minutt gamal, tá Tobias Erikssson legði Kalmar á odda 2-0, áðrenn Ricardo Santos kundi leggja Kalmar á odda 3-0 fáar minuttir seinri. Ein leiðsla sum var í trá við dystargondina, tí sviar vóru betra liðið.

Við eini greiðari leiðslu í skjáttuni, tektu teir seg longur aftur á vøllin at standa, og av tí sama kom EB/Streymur betur við í dystin. Men spenningurin var farin úr dystinum, og tað sást aftur í dystargongdini, har sviar ikki vildu tað stóra, meðan sundalagsmenn ikki megnaðu tað stóra.

Sostatt vann Kalmar ein greiðan 3-0 sigur á EB/Streymi, og eru komnir víðari í Evropa League, meðan sundalagsmenn hava útspælt sín leiklut í evropiskari kapping á hesum sinni.

*post@sosialurin.fo*

## Egil á Bø:

### Fyrsta málið avgjørdi dystin

– Teir skora eitt mál tíðliga í dystinum, og tað gera støðuna hjá okkum sera trupla, segði ein vónsvikin Egil á Bø eftir dystin.

-Uppleggið hjá okkum var at standa kompakt í verjuni, og vera tolnir, so skuldu kjansirnir nokk koma. Men tá teir skoraðu so tíðliga í dystinum, so vóru vit noyddir longur fram á vøllin, segði EB/Streyma liðskiparin.

-Vit vóru jú noyddir fram á vøllin í seinra hálvleiki, men vit kláraðu ikki at seta teir undir trýst, og tá teir so skora tvey mál beint eftir steðgin, so var dysturin í roynd og veru avgjørdur, segði Egil á Bø at enda.

**UEFA Europa League** · Svangaskarð, Toftir, 8. juli 2010

**EB/Streymur – Kalmar** 0-3 (0-1)
**0-1: Erik Israelsson, 9.**
**0-2: Tobias Eriksson, 46.**
**0-3: Ricardo Santos, 50.**
Dómari: Ken Henry Johnsen, Noregi

**EB/Streymur:** René Tórgarð - Gert Hansen, Marni Djurhuus, Egil á Bø, Dánjal Davidsen - Sorin Anghel (Kristoffur Jakobsen, 80.) - Gudmund Nielsen (Leif Niclasen, 61.), Pætur Dam Jacobsen, Daniel Udsen, Bjarni Jørgensen (Hans Pauli Samuelsen, 75.) - Arnbjørn Hansen
***Gult kort:*** Gudmund Nielsen, Sorin Anghel og Pætur D. Jacobsen
**Kalmar:** Petter Wastå - Marcus Lindberg, Paulus Arajuuri, Henrik Rydstrøm, Stefan larsson, Daniel Sobralense (Mattias Johansson, 88.), Daniel Mendes (Johan Bertilsson, 76.), Ricardo Santos (Marcel Sacramento, 76.), Erik Israelsson, Tobias Eriksson, Emin Nouri.
***Gult kort:*** Marcus Lindberg